# ítróttur

Nr. 94 • týsdagur • 18. mai 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo


# Meiri enn fýra mál í miðal

**B68 er framvegis stigaleyst, B36 tykist vera betri fyri, enn tey flestu av hinum, men annars gongur alt framvegis í einum bólki**

3. UMFAR SAMANUM

*Jóannes Hansen*



*Á Toftum siga teir seg ikki stúra so nógv, hóast stigatalvan vísir, at teir eru aftastir og framvegis stigaleysir*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Veðrið var ikki í parti við fótbóltinum sunnudagin. Áarføri fleiri staðni og vindur darvaðu spælinum. Kortini varð spælt alla staðni. Onkra staðni í Eysturoy — her verður hugsað um í Runavík og á Skála — kundu teir havt útsett inntil mánakvøldið. Tað gjørdu teir ikki. Ivaleyst var tað tí, at eitt nýtt umfar longu er á skránni hósdagin.

Toppdysturin hesa ferð — um tað so tíðliga í kappingini ber til at tosa um sovorðið — var í Gøtu. B36 smurdi GÍ av í uppgerð, har tað ikki vóru nógvir málmøguleikar. B36 fekk fult burturúr trimum av fýra, og tá ið GÍ hevði sínar størstu møguleikar, stútaðu teir í stólpan og í hinum førinum hevði Tróndur Vatnhamar rimmar bjarging.

Gøtumenn tykjast ikki vera heilt so væl fyri, sum tað í steypakappingini og í fyrstu umførunum í landskappingini tóktust, at teir vóru. B36 er væl fyri. Hesa ferð vóru tveir veteranar skiftir inn, og tað fer ivaleyst at hava stóran týdning, at teir í B36 eiga so nógvar royndar spælarar at seta inn, tá ið aðrir kanska fara at verða skaddir ella leikbannaðir.

Eftir at fyrsti sættingurin er lagdur um, er B36 mest upplagda FM boðið. Stóri spurningurin er, hvussu tað fer at hilnast hjá Skála. Tað líkist ikki sørt gongdini hjá sandoyingum í 1989. Skála hevur ikki tapt enn, og tað er heilt við síðuna av tí, sum tað hevur verið hjá teimum hini bæði árini í bestu deildini. Í fjør fingu teir ikki fult fyrrenn tað var komið langt út í juni mánað! Men Skála tykist eiga eitt spennandi lið, og nú mugu teir finna seg í at vera favorittar, tá ið teir hósdagin fara á Svangaskarð.

## Málríkt

Í fimm landskappingardystum vórðu skorað 22 mál. Tað er rættuliga sjáldsamt, tá ið havt verður í huga, at tað burtursæð frá í Gøtu var tætt í øllum hinum uppgerðunum.

Tað var málríkast á Skála, men tað var eisini undirhaldandi og málríkt í Runavík, har heimaliðið vann 3-2, og í Klaksvík, har KÍ ikki megnaði meiri enn 2-2 móti EB/Streymi. VB tapti tepurt í Gundadali. Tað eru trý feløg, sum framvegis eiga fyrsta sigurin á. B68 hevur einki stig fingið, og EB/Streymur og VB hava fingið tveir javnleikir í part. VB hevði HB á krókinum, men meistararnir smoygdu trý stig í bksilumman, hóast teir stórar partar av seinna umfarinum vóru kroystir. Tað man boða frá, at HB fer at roynast væl, hóast teir avgørt ikki higartil í landskappingini hava sannført um, at teir eru upplagt boð upp á triðja FM heitið á rað.

Á Toftum siga teir seg ikki stúra so nógv, hóast stigatalvan vísir, at teir eru aftastir og framvegis stigaleysir. Tað er upp til B68 at prógva, at tað er nakað í tí, sum formaðurin sigur. Avrikini hava ikki verið serliga sannførandi. Ímóti NSÍ hekk tað í løtum væl saman. At teir síðstu løtuna tóktust sleppa endanum kostaði nógv.

Hósdagin verður nýtt umfar á skránni. Tá verður spælt soleiðis: B36-NSÍ, KÍ-GÍ, ÍF-HB, B68-Skála og EB/Streymur-VB. Allaruppgerðirnar tykjast rættuliga spennandi og perspektivríkar. Kanska sær B36 út til at vera størsti favoritturin, men NSÍ hevur ofta áður gjørt um seg í Gundadali. HB hevur ofta havt gott tak á ÍF í Fuglafirði. Fuglfirðingar hava staðið seg væl higartil. Men teir hava bara fingið trý stig burtur úr trimum teimum fyrstu umførunum í landskappingini. Nú fæst at síggja, um tað fer at roynast móti meistarunum.

Í Íslandi stóðu útisetarnir seg væl. Í Danmark megnaði Todi Jónsson at koma av beinkinum og gera vart við seg. Verri er støðan hjá teimum í Fremad Amager, sum framvegis hava ilt við at vinna sær fastar sessir.





# Fjakkarar í Budapest

**Eftir ævintýrið seinast í apríl í Dubai, har úrslitini vórðu góð, fóru Martin Poulsen og Hans Kristian Simonsen beina leið til Ungarn at luttaka í IM-kappingini, First Saturday. Serliga væl gekst hjá føroyameistaranum**

TALV

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Tað gekst væl hjá Martini Poulsen, tá hann saman við Hans Kristian Simonsen tók lut í IM-kapping í Ungarn*

Í júst somu kapping í august í fjør, eydnaðist tað John Arna Nilssen at vinna sær sín næsta IM-norm. Kappingin verður fyriskipað hvønn mánaða í árinum, har fyrsta umfar, eftir siðvenju, er fyrsta leygardagin í mánaðinum.

Tað er ikki við peningavinningi í eyga, at ein fer heilt til Ungarn at luttaka í hesum kappingum. Luttakaragjaldið er nevnliga nøkunlunda sama upphædd sum fyrsta virðisløn ljóðar. Hví er First Saturday vælkend og væl vitjað? Jú, kjansirnir at vinna sær normar eru sera góðir, eftirsum fyrireikarin letur hálvgamlar og útbrendar IM´arar pening fyri at luttaka, og samstundis letur ungar framfýsnar normjagstrarar sleppa framat.

## Katastrofan lúrdi

Martin legði væl út og blandaði seg eftir fyrstu seks umførini í oddastríðið. IM-norm kravið var 9,5 stig av teimum 13 umførunum sum telvast skuldu. Hans Kristian fekk hinvegin eina rættiliga keðiliga kappingarbyrjan; 1 stig eftir fyrstu 6 umførini. Tí varð tað av sonnum eitt bragd, at hann fekk kjempað seg uppá 6 stig á endaligu stigatalvuni. Hann hevði enntá 6 stig innan seinasta umfar, men tapti sítt seinasta talv.

Martin var í roynd og veru ongantíð tætt við IM-normin. Eitt skiftið hevði hann 5,5 av 9, og hevði tí kunnað ognað sær normin, um hann vann tey seinastu fýra talvini. Men so varð ikki, og hann endaði loksins á 7,5 stigum, sum gav honum eitt deilt 3. pláss. Eitt gott úrslit, hóast tvey stig frá norminum. Hans Kristian bleiv nr. 10 av 14 luttakararum.

Báðir klintra eftir kappingina rætta vegin uppeftir ratinglistanum. Martin vinnur sær 19 ratingstig á føroyska listanum, og er nú endiliga røttu megin teimum magisku 2300. Hann hevur 2310 á feskasta styrkisbarometrinum. Hans Kristian fer frá 2234 til 2244 eftir úrslitið í Budapest.

## OL 2004

Olympiaduár er, og í ár verður hon telvað á feriuoyggjuni Mallorka frá umleið miðjan oktober til fyrst í novembur.

Kappingin um plássini á føroyska OL-liðnum hevur mangan verið spennandi. Í ár er einki undantak. Vanliga sendur Talvsambandið seks telvarar til OL. Tað tykist rættiliga sannlíkt, at John Arni Nilssen, Heini Olsen, Martin Poulsen, Flóvin Tór Næs og John Rødgaard koma á liðið. Spurningurin er tískil um hvør sleppur við sum sætta umboð.

Á feskasta ratinglistanum sæst, at tað eru serliga trý nøvn sum stríðast um sama mál; Hans Kristian, Olaf Berg og Ólavur Simonsen. Talvsambandið eigur kanska sum skjótast at melda út, nær OL-liðið verður úttikið, soleiðis at telvarar kunna laga kappingarnar eftir hesum. Tað hevði hjálpt væl.

## Ratinglistin 18-05-2004

**Topp 25**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | John Arni Nilssen | HT | 2414 |
| 2 | Heini Olsen | KTF | 2337 |
| 3 | Martin Poulsen | HT | 2310 |
| 4 | Flóvin þór Næs | HT | 2277 |
| 5 | IM John Rødgaard | VT | 2269 |
| 6 | Hans Kristian Simonsen | KT | 2244 |
| 7 | Olaf Berg | HT | 2242 |
| 8 | Ólavur Simonsen | KTF | 2241 |
| 9 | Carl Eli N. Samuelsen | VT | 2213 |
| 10 | Eyðun Nolsøe | KTF | 2211 |
| 11 | Rógvi W. Rasmussen | TFS | 2207 |
| 12 | Heini Danielsen | SF | 2177 |
| 13 | Bogi Ziska | HT | 2166 |
| 14 | Jens Christian Hansen | TT | 2152 |
| 15 | Jóan Hendrik Andreasen | HT | 2151 |
| 16 | Torbjørn Thomsen | KT | 2136 |
| 17 | Torkil Nielsen | ST | 2107 |
| 18 | Steintór Rasmussen | KTF | 2089 |
| 19 | Finnbjørn Zachariassen | TFS | 2085 |
| 20 | Terji Petersen | KTF | 2061 |
| 21 | Rani Nolsøe | KTF | 2048 |
| 22 | Finnbjørn Vang | KTF | 2042 |
| 23 | Martin Brekká | TFS | 2016 |
| 24 | Wille Olsen | KTF | 1993 |
| 25 | Eyðálvur Johannesen | KT | 1976 |

# Talvið hesa vikuna

Martin Poulsen (2290) — David Berczes (2293)
First Saturday May 2004
Budapest (6), 05.05.2004

1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Ric3 Bb4 4.e3 c5 5.Rige2 (Solidur variantur í nimzoindisku byrjanini) 5...cxd4 6.exd4 d5 7.a3 Be7 8.Rif4 dxc4 9.Bxc4 0—0 10.0—0 Ric6 11.Be3 Bd6 12.Rih5 Be7 13.Rif4 Bd6 14.Rih5 Be7 15.d5! (Nei, Martin er ikki nøgdur við javnleik) 15...Rie5 16.Rixf6+ Bxf6 17.Bb3 (Martin hevur lítlan fyrimun orsakað av betri rásarúmi) 17...exd5 18.Rixd5 Be6 19.h3 Ric6 20.Rixf6+ Fxf6 21.Bxe6 Fxe6 22.b4 (Rættiliga kalt telvað. Martin trýr ivaleyst uppá, at hann hevur betri endatalvsteknikk) 22...Rfd8 23.Fc2 a6 24.Rfe1 Ff6 25.Rac1 h6 26.Bc5 Rie5 27.Re3 Rac8 28.Rce1 Rid7 29.Rf3! Fg6? (Fyrsti feilur hjá svørtum. Fg5 var betur) 30.Fxg6 fxg6 31.Re7! (Rók á sjeyndu linju, altíð) 31...Rixc5 32.bxc5 Rf8



Støðumynd eftir 32...Rf8

33.Rb3! Rxc5? (Rf7 ein betur loysn) 34.Rbxb7 Rc1+ 35.Kh2 Rxf2 36.Rxg7+ Kf8 37.Rh7 (Hóttur mát) 37...Kg8 38.Rbg7+ Kf8 39.Ra7 (Tryggjar sær a-finnuna seinni) 39...Kg8 40.Rhg7+ Kf8 41.Rxg6 Rc3 42.Rxh6 Rxa3 (??) (Støðan var tapt kortini) 43.Rh8# 1—0


